# Tunnilin tryggjar lív í Gásadali

**Fyrrapartin í gjár varð tunnilin til Gásadals tikin alment í nýtslu.
Hóast onkur kanska heldur, at hann kemur í seinna lagi, eru fólk í bygdini ikki samd um tað.
- Nú fer lív at koma í, sigur eitt teirra, Pauli Jacobsen.**

TUNNIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Gásadalur:** Tá slíkar stórhendingar fara fram, er vanligt at talur verða hildnar og snórar kliptir.

Men tá tunnilin til Gásadals varð tikin alment í nýtslu fyrrapartin ígjár, var øðrvísi: Ístaðin fyri snóraklipping, vóru tey omanfyri 60 ljósini tendrað í tunilsloftinum.

Frammanundan almennu upplatingini hava menn arbeitt við at seta ljós upp í tunlinum og at frosttryggja hann.

Arbeiðið at gera tunnilin fullkomuliga lidnan er nú at enda komið, og tí er loyvi hjá almenninginum at koyra til Gásadals. Samstundis er bygdin vorðin partur av øllum meginøkinum.

- Vit eru fleiri, sum ivast í, um bygdini hevði verið lív lagað, um tunnilin ikki var komin.

- Vón okkara er nú, at fólkið fer at merkja ein trygglеika, við at vera saman í eini størri kommunu við góðum ferðasambandi, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági.

## Í tøkum tíma

Sum Gásadalsmaður veit Pauli alt um tær umstøðurnar, sum bygdarfólkið hevur livað undir til denna dag.

- Tað er eingin ivi um, at tunnilin kom í tøkum tíma. Kom hann ikki nú, høvdu helst bara verið eini 2-3 fólk eftir í bygdini um nøkur fáa ár, sigur Pauli.

Hann er vitandi um fólk, sum hava hug at búseta seg í bygdini, um bert grundøki vóru tøk. Og ætlanir hava somuleiðis verið frammi um at skipa ein part av dalinum sum summarhúsøki.

Sum skilst verður arbeitt við hesum máli í løtuni, og tí gongur helst ikki long tíð, inntil tey fyrstu sethúsini kunnu verða bygd her.

Pauli væntar tí at fólk fer at flyta aftur til Gásadals í framtíðini.

- Hví skuldu tey flutt av bygdini beint nú, ið vegasambandið er vorðið so gott?!

- Nei, eg vænti heldur hinvegin, at fólk fer at flyta higar, sigur Pauli Jacobsen.

## Framtíðin

Við hátíðarhaldið fyrrapar tin í gjár nýtti vinnumáláráðharrin, Bjarni Djurholm høvi at vísa á gongdina í arbeiðinum við Gásadalstunlinum.

Hann vísti til filmin frá 1990 við heitinum “1700 metrar frá framtíðini”, ið snúði seg júst um livilíkindini í hesi fjarskotnu bygdini.

- Leingi er tað ið væl skal vara. Tá í tíðini trúði neyvan nakar, at ein tunnil fór at verða gjørdur til Gásadals.

- Men nú er hann her. Og so er hann eisini munandi styttri enn teir 1700 metrarnir, legði hann aftrat.

Síðani tendraði hann ljósið í tunlinum á fyrsta sinni, soleiðis at myrkrið ikki longur valdar her.

Nú sær kanska ljósari út – eisini hjá gásadalsfólki!

### Gásadalsbrekkan

Knuggaðu seigan brekkuni mót
fatlaða byrðan teir tyngdu
um grønan svørð – millum gamalt grót
í brattlendi gøtan seg ringdi.

Á Skarði var sjáldsom berbakað sjón
so tungt mangt sporið teir stigu
traðkaðu treiskir í húðarskóm
alt meðan øldirnar liðu.

Hin gamli í kistu borin var
í tolni tey tárini feldu
og unga lívið í skundi um Skarð
í neyðini skýrt var í keldu.

Men onkuntíð lættføttur, fróður rann
um Skarðið ein langur hali
tá skyldfólk og kenningar tustu fram
til fróðarfundir í Dali.

Men tíðin broyttist og brátt hon bjóð
í Dalinum fækkaðum liði:
Teir gjørdu um fjallið nýggja slóð
til lívið í nýggjum siði.

Nú fjallið er fallið í fornan grið
bert ferføtt í brekkuni ganga
á gøtuni grasið grør í frið
í einsemi løtuna langa.

Enn ringir seg gøtan, men nú er hon svinn
av týdningi bara eitt eiti
nú bilarnir koyra í túnið inn
tey gøtuna toga til teiti.

**Køge, oktobur 2006
Jógvan Steintún**



*- Tunnilin kom í tøkum tíma, heldur gásadalsmaðurin, Pauli Jacobsen. Hann fegnast um at bygdin nú er vorðin partur av meginøkinum*



*Tíðin broytast. Stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes vísir almenninginum, at nú ferðast ein ikki longur undir egnari ábyrgd til Gásadals*



*Tveir av arbeiðsmonnunum hjá Landsverki, sum kunnu líta aftur á lokið verk*